Nýggj vakurleikarød í Body Shop

Body Shop í SMS hevur fingið eina spildurnýggja smyrsl rød

Mynd: Jens Kr. Vang

HANDILSLÍV
Ingrid Bjarnastein

Praktikantarnir her á Sosialinum vóru ein túr í Body Shop fríggjamorgunin. Her fekk varð onnur teirra smurd, meðan nágreiniligar frágreiðingar fylgdu við um, hvat varð gjørt og hví.

Body Shop í SMS hevur júst fingið eina spildurnýggja rød av smyrsli. Smyrslið eitur The Body Shop Make up, og er tað komið í staðin fyri Body Shop Colorings.

Ein kendur maður innan make-up heimin, Chase Aston, hevur staðið fyri nýggju og spennandi røðini.

Litirnir eru nógvir og fjølbroyttir.

– Krem eru til øll sløg av húð, turra, feita og so framvegis. Kremini fáast í 14 litir, og er hetta nógv meira at velja í enn áðrenn, sigur Asloy Winther, leiðari í The Body Shop.

Nógvir nýggir eygnaskuggar eru eisini komnir. Tað nýggjasta til heystið eru jørðlitir og kaldir litir. Eisini er ein heilt serlig rød av eygnaskuggum til tey ungu. Hetta er slagið, sum glitrar, og kanst tú brúka tað í nógvum ymsum samanhangum.

Heili 38 litir av varrastift eru at velja ímillum, umframt lipgloss og annað gott.

Sum nakað nýtt er Brush On kinnareytt í kúlum. Hetta ger, at kinnabeinini síggjast betri, og eisini er serligur litur í, sum ger at kinnabeinini síggja skínandi út.

Annar av praktikantunum á Sosialinum, Sólrun Hansen, varð smurd uppi í Body Shop í SMS fríggjadagin. Asloy Winther, leiðari og Rúna Hansen, hava lagt smyrlið á

Mynd: Jens Kr. Vang

GALDANDI FRÁ 1. OKT. til 1. MAI

TYRLUFERÐAÆTLAN

VETURIN 2002/2003

SUNNUDAG	Fráferð
Vágar	12.00
Gásadal	12.06
Mykines	12.12
Vágar	12.23
Vágar	13.00
Koltur	13.07
Tórshavn	13.12
Skúvoy	13.27
Dímun	13.32
Skúvoy	13.37
Tórshavn	13.52
Klaksvík	14.04
Klaksvík	14.35
Svínoy	14.47
Kirkja	14.51
Hattarvík	14.54
Klaksvík	15.12
Tórshavn	15.24
Koltur	15.29
Vágar	15.36

MIKUDAG	Fráferð
Vágar	09.45
Gásadal	09.51
Mykines	09.57
Vágar	10.08
Vágar	11.10
Koltur	11.17
Tórshavn	11.22
Skúvoy	11.37
Dímun	11.42
Froðba	11.51
Froðba	12.35
Dímun	12.44
Skúvoy	12.49
Tórshavn	13.04
Klaksvík	13.16
Svínoy	13.28
Kirkja	13.32
Hattarvík	13.35
Klaksvík	13.53
Klaksvík	14.40
Tórshavn	14.52
Koltur	14.57
Vágar	15.04

FRÍGGJADAG	Fráferð
Vágar	09.45
Gásadal	09.51
Mykines	09.57
Vágar	10.08
Vágar	11.10
Koltur	11.17
Tórshavn	11.22
Klaksvík	11.34
Svínoy	11.46
Kirkja	11.50
Hattarvík	11.53
Klaksvík	12.11
Klaksvík	13.00
Tórshavn	13.12
Skúvoy	13.27
Dímun	13.32
Froðba	13.41
Froðba	14.15
Dímun	14.24
Skúvoy	14.29
Tórshavn	14.44
Koltur	14.49
Vágar	14.56
Vágar	15.30
Gásadal	15.36
Mykines	15.42
Vágar	15.53

Prísir	Mykines	Gásadal	Vágar	Koltur	Tórshavn	Skúvoy	Dímun	Froðba	Klaksvík	Svínoy	Hattarvík	Kirkja
Mykines		85,-	145,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	360,-	360,-	360,-	360,-
Gásadal	85,-		145,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	360,-	360,-	360,-	360,-
Vágar	145,-	145,-		130,-	215,-	335,-	335,-	360,-	360,-	360,-	360,-	360,-
Koltur	290,-	290,-	130,-		85,-	215,-	215,-	290,-	290,-	290,-	290,-	290,-
Tórshavn	215,-	215,-	215,-	85,-		130,-	130,-	215,-	215,-	215,-	215,-	215,-
Skúvoy	335,-	335,-	335,-	215,-	130,-		85,-	85,-	335,-	335,-	335,-	335,-
Dímun	335,-	335,-	335,-	215,-	130,-	85,-		85,-	335,-	335,-	335,-	335,-
Froðba	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	85,-	85,-		360,-	360,-	360,-	360,-
Klaksvík	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-		110,-	110,-	110,-
Svínoy	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	110,-		110,-	110,-
Hattarvík	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	110,-	110,-		85,-
Kirkja	360,-	360,-	360,-	290,-	215,-	335,-	335,-	360,-	110,-	110,-	85,-	

Galdandi frá 1. oktober til 1. mai

BÍLEGGING
Tel 34 10 60
Fax 34 10 61
Mán. - Frí.
Kl 08.00 - 16.00
Sun.
Kl. 12.00 - 16.00

BØRN
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

VIÐFØRI
Í mest lagi 20 kg.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin • FO-280 Sørvágur
Tel. 34 10 60 • Fax 34 10 61 • booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

Select

Varaleiðari!

Søkt verður eftir varaleiðara til Shell-støðina við Norðara Ringveg, í Havn, at byrja frá 15. oktober ella sum skjótast.

Starvið:
Starvið umfatar í høvuðsheitum, at hava ábyrgdina av innkeypinum, vøruuppfylling og reingerðini. Viðkomandi verður eisini í staði leiðarans, tá ið hesin er burturstaddur.

Eginleikar:
Vit ímynda okkum at umsøkjarin hevur royndir innan handil hetta er tó ikki eitt krav, annars

- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar

Løn:
Løn sambært útbúgving og royndir.

Umsóknir:
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til: Shell-støðin, Norðari Ringvegur, Smoga 188, Fo-110 Tórshavn, innan 10. oktober. Eru spurningar viðvíkjandi starvinum, vinarliga vendi tykkum til Hans Godtfred Thomsen.

Shell-støðin við Ringvegin er fyri 2 mánaðum síðani gjørd um til eina Select-støð. Hetta merkir at vit nú baka breyð, rundstykkir og wienarbreyð sjálvi. Eisini fáast tær vælsmakkandi Select pylsurnar. Umframt hetta er nú eisini størri úrval av matvøru.

www.shell.fo

Tobbi gongur nýggjar leiðir

Tórbjørn Jacobsen brýtur eitt gamalt prinsipp hjá Tjóðveldisflokkinum og fer upp í tvær týðandi nevndir í Fólkatinginum. Tað tænir føroyskum endamálum best, sigur tjóðveldismaðurin, sum hevur tikið avgerðina uttan formliga viðgerð í flokkinum

POLITIKKUR
Eyðun Klakstein

Tá danska Fólkatingið týsdagin kemur saman aftur, fer Tórbjørn Jacobsen at lata seg velja í tvær nevndir hjá danska tinginum.

Hetta er fyrstu ferð, at eitt tjóðveldisumboð tekur hetta stig, men Tobbi ivast ikki í, at hetta er eitt rætt stig at taka.

– Tað er í nevndunum, tann veruliga politiska viðgerðin í Fólkatinginum fer fram, og tað er har, at avgerðir verða tiknar. Tí fari eg í tvær av nevndunum, har mál, sum føroyingar hava áhuga í, koma til viðgerðar, sigur Tórbjørn Jacobsen.

– Á tann hátt kann eg upplýsa og vónandi ávirka avgerðir, sum hava við Føroyar at gera, men eg ætli mær framvegis at halda meg uttan fyri øll mál, sum er donsk burturav, sigur hann.

Brýtur gamalt prinsipp

Tórbjørn Jacobsen fær umboð í Uttanríkisnevndini og tí Politisku-Búskarligu nevndini, og hesar sessir fær hann umvegis tekniska tingbólkin, sum Norðuratlantsbólkurin mannar saman við Javnaðarflokkinum, Radikala Vinstra, Eindarlistanum og SF.

Hesin bólkur fær tillutað eitt ávíst tal av nevndarsessum, og so er tað ein innanhýsis handil at býta sessirnar. Tórbjørn Jacobsen hevði í fjør møguleikan at fáa onkran nevndarsess, men hann segði nei takk, júst sum tjóðveldisumboð á Fólkatingið plaga at gera.

Fyrstu nógvu árini, eftir at Tjóðveldisflokkurin var stovnaður í 1948, stillaði hann ikki upp til fólkatingsvalið, men hetta broyttist seinni. Tá Erlendur Patursson var fólkatingsmaður í sjeytiárunum, helt hann seg burtur frá øllum nevndararbeiði, og higartil hevur Tjóðveldisflokkurin havt tað prinsipp, at tað er bara talarastólurin í Fólkatingssalinum, sum skal brúkast.

– Onkur kann halda, at vit glíða eitt sindur í koblingini, nú eg fari upp í hesar nevndirnar, men eg ivist ikki í, at hetta er ein gongd leið. Fólkatingslimir hava víst eina stóra óvitan um føroysk viðurskifti, og um eg nú kann vera eitt slag av pedagogiskum stuðli í tveimum av nevndunum, so er tað fint, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Vistu ófatiliga lítið

Tórbjørn Jacobsen legði í seinastu fólkatingssetu eitt uppskot fram, har hann vildi hava Fólkatingið at áleggja stjórnuni at boða ST frá, at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt. Málið fekk eina viðgerð í fólkatingssalinum og varð so beint í Politisku-Búskaparligu nevndina.

– Tað var ótrúligt, hvussu lítið nógvir týðandi danskir politikarar vistu um føroysk viðurskifti, og hvussu teir misskiltu uppskotið. Summi hildu, at hetta var eitt uppskot um, at føroyingar skuldu loysa frá Danmark, sigur Tórbjørn Jacobsen.

– Kjakið í Fólkatinginum er avmarkað, áðrenn tað verður sent í onkra nevnd. Skal eg kunna fylgja einum slíkum máli, so má eg verða við í nevndini, tí tað er har, at veruliga politiska viðgerðin fer fram, og har kann eg betur ávirka viðgerðina og rætta misskiljingar.

Uppskotið um føroyska sjálvsavgerðarrættin fall burtur, tá Fólkatingið fór í summarfrí, men Tórbjørn Jacobsen umhugsar nú, at leggja uppskotið fram av nýggjum.

Tikið avgerðina sjálvur

Hava tit viðgjørt tína avgerð í Tjóðveldisflokkinum?

- Ætlanin hevur fleiri ferðir verið at hava eitt kjak á flokstinginum, men tað er ongantíð komið til tað enn. So avgerðina um at fara upp í nevndinar havi eg sjálvur tikið, sigur Tórbjørn Jacobsen.

– Tað er ein fullkomiliga óverulig støða at sita í tveimum parlamentum í tveimum ymsikum londum, tað átti als ikki at verið so, og tí er hesin fólkatingssessurin ringur at hava við at gera. Mín greiða fatan eftir 10 mánaðir í Fólkatinginum er, at skal eg kunna ávirka mál, sum hava føroyskan áhuga, so má eg verða við í viðkomandi nevndum, og tað er tað, sum eg nú verði.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Høgna Hoydal, formanni í Tjóðveldisflokkinum, áðrenn hetta blaðið hevði evstamark.

– Onkur kann halda, at vit glíða eitt sindur í koblingini, nú eg fari upp í hesar nevndirnar, men eg ivist ikki í, at hetta er ein gongd leið. Fólkatingslimir hava víst eina stóra óvitan um føroysk viðurskifti, og um eg nú kann vera eitt slag av pedagogiskum stuðli í tveimum av nevndunum, so er tað fint, sigur Tórbjørn Jacobsen

Javnt millum andstøðu og samgongu

Sambandsflokkurin missir nógv í nýggjari veljarakanning, men samgongan hevur framvegis ikki meiriluta á tingi, eins og allar veljarakanningar hava víst síðani valið

VELJARAKANNING
Eirikur Lindenskov

Sambært nýggjastu veljarakanningini, so stendur nú á jøvnum millum andstøðu og samgongu. Veljarakannigin verður kunngjørd í Fregnum í gjár, og er tað Gallup, sum gjørt hevur kanningina fyri blaðið.

Sambandsflokkurin er stóri taparin í kanningini, meðan tað stendur so at siga í stað hjá øllum hinum flokkunum.

Fólkaflokkurin fekk á valinum í april 20,8%. Hann fær í nýggjastu kanningini 21,1%.

Sambandsflokkurin fekk á valinum seinast 26,0%. Men í øllum kanningum síðani hevur flokkurin havt stóra framgongd – seinast lá hann uppi á 29,3%, men í nýggjastu kanningin fær hann minni undirtøku, enn hann fekk á valinum, 25,6%.

Javnaðarflokkurin fekk á valinum 20,9% – hann fær í nýggju kanningi eina framgongd til 21,7%.

Sjálvstýrisflokkurin hevur í fleir kanningunum síðani valið fingið so lítla undirtøku, at hann ikki fær umboð á tingi. Seinasta kanningin staðfestir hetta, tí flokkurin fær bara 3,6% – tinggáttin er 3,7%.

Tjóðveldisflokkurin fær neyvt tað sama, sum flokkurin fekk á valinumí apríl, 23,7%, og Miðflokkurin hevur eina lítla framgongd frá 4,0% á valinum til 4,2% í nýggjastu kanningini.

Veljarakanningin hjá Fregnum gevur samgongu og andstøðu 16 tingmenn í part, og hevur samgongan sostatt framvegis ikki vunnið seg upp aftur á tey 17 tingumboðini, sum teir fýra flokkarnir fingu á valinum 30. apríl.

Eydnuhjól
við livandi djórum
og meksikansk uppboðssøla
av einum veðri



í Ítróttarhøllini á Skála
leygardagin 28. september, kl. 17.00

Vinningarnir í eydnuhjólinum eru veðrur, lomb, dunnur, gæs, fiskamatur og oksakjøt.
Eisini verður vørutombola og kaffisøla.

Skála Ítróttarfelag